**Heimarøktin og Serforsorgin**
Stuðulsskipanin fyri Vaksin

# Stuðlar til Stuðulsskipanina fyri vaksin

## Stuðulsskipanin fyri Vaksin søkir eftir 3 stuðlum til 2 brúkarar í Tórshavn.

**1. starvið** snýr seg um ein mann í 30'inum, við sálarligum trupulleikum. Uppgávurnar eru m.a. at stimbra mannin í teim dagligu uppgávum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan gerandisdag. Talan er um 10 tímar um vikuna, at byrja sum skjótast.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar, heilsuhjálparar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið.

Meira fæst at vita um hetta starvið við at venda sær til Einu Andreasen, ergoterapeut á Stuðulsskipanini fyri Vaksin.

**2. starvið.**
Ert tú liðug/ur við tína miðnámsútbúgving og saknar tær avbjóðingar og kundi hugsað tær eitt øðrvísi og spennandi arbeiði? So hygg her!!

Stuðulsskipanin fyri Vaksin søkir eftir 2 stuðlum til ein vælvirkandi persón, ið gongur á miðnámsskúlanum í Hoydølum.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- fylgja næminginum tætt í gerandisdegnum meðan næmingurin er í skúla.
- hjálpa næminginum at koma til og frá heiminum og í skúlan.
- fara við viðkomandi til venjingar/fysioterapi o.a.
- fara við viðkomandi til ymisk frítíðarvirksemi.

**Arbeiðstíðin.**
Er 55 tímar um vikuna til 2 stuðulsfólk. Tímabýtið millum bæði stuðulsfólkini er ikki ásett enn. Starvið verður sett 1. august 06 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava eina miðnámsútbúgving ella umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar, heilsuhjálparar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið.

Meira fæst at vita um hetta starvið við at venda sær til Finnur Joensen, sosialráðgeva á Stuðulsskipanin fyri Vaksin.

Fyri øll størvini er galdandi, at hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 26.07.06 sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Løkjatúni 1,
F0–160 Argjum · Tlf. 354020



HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Avloysari fyri djóralækna

Søkt verður eftir djóralækna til matvørudeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Starvið er avloysarastarv og gongur frá umleið 1. oktober til 15. juni.

Alment fevnir starvið um alt vanligt virksemi, sum gongur fyri seg á matvørudeildini, so sum
- Málsviðgerð
- Eftirlit á fiska- og matvøruvirkjum
- Skoðan
- Fakligar metingar og ráðgeving
- Annað

**Serliga øki starvið fevnir um er:**
- Fakligur ábyrgdarhavandi av eftirliti við innflutningi av matvørum úr djórum og fiski og livandi djórum; serliga innflutningi av matvørurm úr triðja londum (um marknaeftirlitsstøðirnar)
- Innflutningseftirlit og løggilding av innflytarum av matvørum
- Málsviðgerð av og eftirlit við fiskamjølsvirkjum
- Málsviðgerð av matvøruvirkjum sum framleiða til heimamarknaðin.

**Faklig krøv**
Útbúgving sum djóralækni krevst.

**Vit ynskja at tú:**
- Kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva
- Hevur góð evnir at samskifta við onnur, bæði í skrift og í talu
- Hevur koyrikort til bil
- Dugur enskt í skrift og talu umframt kunnleika til EDV.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo Umsóknir við avriti av prógvi, CV, viðmælum o.t. skulu vera Starvsstovuni í hendi í seinasta lagi 25. juli 2006.

**Stutt um matvørudeildina:**
Á matvørudeildini starvast íalt 10 fólk. Deildin tekur sær av
- góðkenning av og eftirlit við matvøruvirkjum, (íalt er talan um eini 600 góðkenningareindir)
- inn- og útflutningi av matvørum
- kunngerðararbeiði
- yvirvøku- og annað eftirlitsarbeiði
- veterinerar uppgávur, sum náttúrliga hoyra til á matvørudeildini.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni www.hfs.fo

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, telf. 346400 ella Óluvu Niclasen, deildarleiðara, tlf. 356433.



Sosialurin Sosialurin i



# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**